# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Takkarkvøða frá Ernu og Njál



*Týsdagin 13. mars vóru Erna og Njál og vitjaðu á slottinum í Oslo saman við børnunum*

Vit hjúnuni vilja á henda hátt senda takkarkvøðu til tykkum øll um landið, ið sendu okkum heilsanir, nú Haraldur kongur hevur heiðrað okkum fyri arbeiði okkara her í Noregi.

Serstakliga takk til Jóannes Eidesgaard løgmann fyri hugnaligu heilsanina. Tað hevur verið hugnaligt at fingið heilsanir úr fleiri londum, men mest av øllum hevur tað glett okkum tey góðu orð vit hava fingið frá teimum, ið hava havt brúk fyri hjálp frá okkum, og familjum teirra um alt landið.

Tá vit vóru ung, søgdu vit við hvønn annan, at um vit megnaðu bert at hjálpa einum menniskja, so hevði lív okkara ikki verið nyttuleyst. Av øllum heilsanum vit hava fingið, eru vit sera bilsin yvir, hvussu nógv tey eru, ið hava fingið eina hjálpandi hond at halda í tá trupulleikar og neyðin strongdi á, og sum hava fingið hjálp bæði handaliga og andaliga.

Sjálvsagt eru vit glað og takksom, men vit hava so mikið av skili, at vit stillisliga og eyðmjúkliga senda tøkkina víðari til Harran, ið kallaði okkum til hesa uppgávu.

Hans Andrias Djurhuus, sáli, yrkti so vakurt um føðilandið í einum av barnarímum sínum:

*Hetta landið er mítt,*
*hetta landið er títt,*
*sum tað liggur í havi*
*so fagurt og frítt.*
*Her er heimið hjá mær,*
*her er heimið hjá tær –*
*og tað sigur við teg:*
*"Tú skalt minnast meg altíð*
*um allan tín veg."*

Í sannleika eru vit heppin, ið aldust upp í einum so góðum og tryggum landi sum Føroyum.

Barnaheim okkara vóru góð og trygg, har bæði foreldur, familja og grannar fjálgaðu um okkum.

Vit aldust upp í okkara andaliga heimi í Frelsunarherinum. Har vóru nógv, ið vóru um okkum og sýndu umsorgan og kærleika.

Vit byrjað í arbeiði millum gøtufólkið (tey heimleysu) í eini broytingartíð hjá rúsumsorgini. Nógv skuldi broytast og byggjast uppaftur. Ikki altíð var tað lætt, og stundum var ósemja millum landspolitikarar og kommunur. Sum árini gingu, var samstarvið betur, og nú er tað á góðari leið. Samstarvið millum okkum og tað almenna hevur gingið væl, og tað hevur verið sera gott seinastu árini. Avbjóðingar hava verið, men ein hevur alla tíð funnið eina góða semju til frama fyri brúkaran.

Vit hjúnuni vóru sera glað yvir at Oslo býur heiðraði okkum við St. Hallvard medaljuni í ár 2000. Tað er størsti heiður ein borgari í Oslo kann fáa, og var tað tekin um at býarstjórnin virdi tað arbeiði ið Frelsunarherurin hevði gjørt.

At vit nú, sjey ár seinni skuldu fáa heiður frá kongi, er tekin um at arbeiði, ið vit umboða er viðurkent um alt landið.

Vit eru sera stolt av øllum, ið arbeiða í rúsumsorg Frelsunarhersins í Oslo. Tað eru 150 sum nú eru í føstum starvi har. Harafturat er tað ein stórur hópur, ið arbeiðir sjálvboðin.

Eisini hevur rúsumsorg Frelsunarhersins eitt fjøllbroytt arbeiði í fleiri býum víða hvar um landið.

Týsdagin 13. mars vóru vit og vitjaðu á slottinum saman við børnum okkara.

Haraldur kongur og vit tosaðu saman um millum annað, tá hann sum krúnprinsur vitjaði í Føroyum. Vit hittust eisini í norska sendiráðnum í Reykjavík í 1967.

Sonja drotning hevur í nógv ár havt stóran áhuga fyri arbeiði okkara í "VITANUM" í Urtagøtuni 16. Tvær ferðir hevur hon vitjað har, og triðju ferð vóru øll boðin til gudstænastu í slotskapellinum saman við kongsfamiljuni.

Vit bæði hava havt ta stóru gleði at fingið eina "stórfamilju" her í Noregi. Tað krevur í sannleika sítt. Tað er rætt at tað eru nógvir sorgtungir og dimmir dagar, men rætt sum er koma glottar í. Síðsta mánadag vitjaðu vit ein, ið uttanríkistænasta landsins hevur hjálpt úr fangatippi í Jemen. Samarbeiðið við Frelsunarherin gekk væl, og hann kom aftur til Oslo fyri einari viku síðani. Hann hevur búð hjá Frelsunarherinum í nógv ár, áðrenn hann fór uttanlands. Nú býr hann í herbergi okkara her í Oslo. Tá vit skiltust segði hann:"Takk fyri at tit og Frelsunarherurin eru til! Eg havi ongan annan!"

Nú Erna er farin frá vegna aldur og Njál hevur eitt ár eftir, er spurningurin: Hvat nú? Svarið er einfalt: So leingi hjarta slær og heilsan er góð koma vit bæði, um Gud vil, at gera tað vit megna at arbeiða ímillum menniskjur, ið treingja okkum, tað er gøtufólkið, tey heimleysu, okkara stórfamilja!

Gud vælsigni tey, og tykkum ið lesa hesa takkarkvøðu!

Gud signi várt føðiland Føroyar!

**Erna og Njál**

# Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá kæri maður mín, góði pápi, sonur, verfaðir, beiggi, versonur og svágur okkara

**Jákup Augustinussen**
Hoyvík

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri alla ta hjálp, sum veitt varð okkum í samband við jarðarferðina.
Takk fyri góð orð frá Hera Joensen, presti, í kapellinum og kirkjuni.
Takk til tykkum, ið stóðu fyri ervinum.
Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur til okkum og Krabbameinsfelagið.
Takk fyri góð minningarorð og til øll tykkum mongu, sum fylgdu Jákupi til hansara seinasta hvíldarstað.

**Olevina, Rakul, Randi og Hanna**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu og beinasemi, tá kæri maður og pápi okkara

**Símun Berthelsen**

so brádliga varð tikin frá okkum.
Takk fyri vitjanir, uppringingar, blómur, kransar og gávur til missiónshúsið.
Takk fyri vøkur, troystarrík orð í kapellinum, heima og í kirkjuni.
Hjartans tøkk fyri stóru hjálpina við jarðarferðina og ervið.
Takk til familju, vinir og grannar, ið hava verið so væl um okkum, og stóra tøkk til øll tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Ein serlig tøkk til manningina umborð á Strandingi.
Jesus veri hjá okkum øllum.

**Etly, Pauli, Dania og Jákup**

**Dagurin**

**20. mars. Gordius,** deyður umleið 300. Rómverskur hermaður, sum gjørdist kristin og varð tikin av døgum.